


*– Hetta er sum at vinna í Lotto, sigur ein ovurfegin Gunnar Restorff, sum innan fyri tað næsta árið leggur leiðina út í heim saman við familju sínari at lesa*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Møguleiki fyri lívið

Gunnar Restorff hevur fingið lestrarstuðul úr einum serligum gávugrunni til uttanlanda lestur. Sama dag fekk hann eisini at vita, at hann hevði fingið starv við studentaskúlan í Hoydølum. Hann er komin heim at arbeiða, men einaferð komandi ár fara hann og familjan at gera nýtslu av stuðlinum, sum hann hevur fingið. Tí sum hann sigur sjálvur, er hetta ein møguleiki, sum bert kemur einaferð í lívinum

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Stuðulin, sum Gunnar hevur fingið, gevur honum møguleika til at fara uttanlanda at lesa í eitt ár. Gunnar hevur seinastu fimm árini lisið í Danmark, og í november í fjør var hann liðugur við kandidatútbúgving sína innan støddfrøði.

Grunnurin, sum letur stuðulin, varð stovnaður við fæinum frá einum ríkmanni, sum æt Waldemar Andersen. Hesin doyði í sekstiárunum, og lat hann ognir sínar í hendan gávugrunnin, sum letur ferðastuðul til kandidatar innan støddfrøði frá universitetinum í Keypmannahavn.

Samstundis fekk hann eina aðru flugu í sama slagi. Tí sama dag sum hann fekk stuðulin, fekk hann at vita, at hann hevði fingið starv við studentaskúlan í Hoydølum.

– Sjálvandi kemur ein slíkur møguleiki, júst tá ein er tilreiðar at festa røtur. Men eg hevði verið galin at sagt nei takk, so vit fara øll um innan fyri eitt ár, sigur Gunnar, sum júst er fluttur heim saman við sínari familju.

## Alt goldið

– Hetta er ein ótrúligur møguleiki, sigur Gunnar, sum er rættuliga spentur. Hann vísir á, at við flestu stuðlum er tað jú soleiðis, at tað er ein ávís upphædd, sum verður latin. Soleiðis er ikki við stuðlinum úr grunninum hjá Waldemari Andersen.

Hann umfatar allar útreiðslur so sum lesnað, kost og logi og so framvegis - eisini fyri familjuna hjá Gunnari. Tó ikki møguligan lesnað hjá gentu hansara í tíðarskeiðinum.

Ongin ávís upphædd verður latin. Og har er heldur onki loft fyri, hvussu langt upp kostnaðurin kann fara. Tað vil siga, at Gunnar ger sjálvur av, hvar hann vil fara, og so verður upphæddin sett eftir tí.

Men sjálvandi eru nakrar treytir og fyrireikingar, sum skulu gerast áðrenn.

Gunnar skal gera eina lestrarætlan fyri seg sjálvan, eina fíggjarætlan og fáa sær kontaktir, har hann skal undir lesnað. Hetta skal alt gerast á einum realistiskum støði og síðani góðkennast, áðrenn tað letur seg gera.

Hvagar leiðin gongur, hevur Gunnar ikki endaliga gjørt av, men hann sigur, at hann hevur hugsað nógv um Toronto í Kanada. So tað kann verða, at leiðin hjá teimum liggur tann vegin um eitt knapt ár.

## Vann lutakast

Ikki mong verða liðug um árið við kandidatútbúgving innan støddfrøði á universtitetinum í Keypmannahavn. Um tíggju í miðal. Millum hesi verður so lutakast um, hvør skal verða tann hepni móttakarin av lestrarstuðlinum.

Gunnar greiðir frá, at hann hevði hoyrt um hendan stuðulin frá øðrum, sum hava fingið hann, men annars visti hann ikki nógv um hann.

– Tað er nokk so loyniligt alt hetta við stuðlinum. Vit vistu ikki eingongd, nær tað lutakastið var, greiðir hann frá.

Tað er ein advokatfyritøka, sum umsitur grunnin og tekur sær av lutakastinum.

Fráboðanina um, at hann hevði fingið stuðulin fekk hann fyri einum mánaði síðani. Hann bleiv rættuliga kløkkur, tí tá helt hann, at lutakastið hevði langt síðani verið.

– Eg fekk ein stóran brævbjálva sendandi. Helt fyrst, at tað mátti vera okkurt, sum var komið skeivt fyri. Eg droymdi ikki um, hvat tað var, tá eg læt hann upp. Men tá eg so sá bókina um Waldemar Andersen, sum var við, visti eg beinanvegin, sigur hann.

– Sjálvandi bleiv eg sera glaður. Satt at siga púra paff. Tað mundi taka mær eitt døgn at koma niður aftur á jørðina, greiðir hann flennandi frá.

Gunnar væntar, at fólk fara nú at siga, at hetta hevur hann fingið orsakað av ummælinum, men soleiðis er tað ikki við hesum.

Hann samanber tað við at vinna í Lotto.

## Leypir í tað

Gunnar hevur ætlanir um seinni at fara at arbeiða innan gransking. Har er ein partur av treytunum, at hann hevur verið uttanlands í lestrarørindum. Tað fær hann við hesum stuðlinum.

Hann følir seg sera hepnan og er ikki í iva um, at hetta er ein møguleiki fyri lívið. Og tað kann ikki annað sigast, tí tað eru ikki mong, sum fáa møguleikan til at fara uttanlanda í lestrarørindum og fáa sína familju við.

Samstundis leggur hann dent á, at hann ikki er stúrin fyri at royna hetta.

– Eg leypi í tað, so fáa vit at síggja, hvussu tað gongur. Eg fái so í øllum førum ongantíð hendan møguleikan aftur, sigur Gunnar Restorff at enda.



# Agenda 21

TÍÐINDASKRIV
*Innlendismálaráðið*

Nú verður gjørd ein roynd at seta á stovn eina Lokal Agenda 21-skrivstovu í Føroyum. Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í umhvørvismálum, hevur gjørt av at lata Føroya Kommunufelag stuðul av játtanini til umhvørvisverndartiltøk til eina verkætlan, sum hevur til endamáls at staðfesta, um áhugi og tørvur er á eini Lokal Agenda 21-skrivstovu í Føroyum.

Ætlanin er, at skrivstovan í fyrstu atløgu skal virka fram til 31. desember 2005. Tað, sum er eftir av hesum árinum, verður denturin lagdur á at seta skikkað fólk í starv, sum skal fara undir kunnandi virksemi, til tess at vekja áhugan ímillum kommunur, feløg og einstaklingar at fara undir ítøkilig umhvørvistiltøk.

Tað stendur øllum í boði at luttaka og nýta tænasturnar hjá skrivstovuni. Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum sigur seg vóna, at áhugin verður stórur, soleiðis at skrivstovuni verður lív lagað.

Íverksetan av Agenda 21 ætlanini um umhvørvistiltøk hjá kommunum og landi er partur av samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu.

# Ókeypis internet um náttina

**Allan julimánað verður tað ókeypis hjá internetkundum hjá Føroya Tele at nýta internetið um náttina**

INTERNET
*Tíðindaskriv*

– Null krónur pr. megabyte allar julinæturnar. Tað er summartilboðið frá Føroya Tele.

Allan julimánað kunnu privatir I-net breiðbandskundar vera á netinum hvørja nátt millum midnátt og 08 um morgunin – púra ókeypis!

I-netkundar kunnu ljósu næturnar allan juli rógva út á alnetinum, taka niður tónleik og filmar o. s. fr., púra ókeypis.

Hervið setir Føroya Tele í verk tað, sum aðrastaðni verður kallað flat-rate.

Flat-rate-hugtakið merkir, at talan er um eitt fast gjald fyri eina tænastu, uttan mun til, hvussu nógv tú brúkar tænastuna.

# Mikukvøld er byrsukvøld

Sunda Byrsufelag hevur havt ársaðalfund, og nýggj nevnd varð vald. Í nevndini sita nú Michael Dalbø, formaður; Marius Joensen, næstformaður; Rúni Debes, peningarøkil; Jóanes Joensen, nevndarlimur og Robert Hansen, nevndarlimur. Magni Dam og Áslakkur Johannesen eru tiltakslimir.

Sunda Byrsufelag hevur skjótibreyt millum bygdirnar Norðskála og Svínáir. Í fyrstu atløgu verður vant mikukvøld klokkan 19:00 og leygarmorgun klokkan 10:00. Talan er um skeetskjóting, og øll áhugaði eru vælkomin at royna seg.

**-hkm**

# Kvinnur dystast

Finalan í Steypakappingini hjá kvinnum millum EB/Streym og KÍ verður leygardagin tann 3. juli klokkan 17:00 á Tórsvølli. Dómari til dystin verður Petur Skarðenni. Hjálpardómarar verða Magni Hansen og Laurits í Króki. Fjórði dómari verður Jónleif Frederiksen.

**-hkm**


# Leiðari og telduvørður til nýggja KT-tænastu

**Fróðskaparsetur Føroya hevur skipað eina nýggja KT-tænastu. Nú verður søkt eftir tveimum fólkum, einum KT-leiðara og einum telduvørði, sum skulu skipa, menna og útbyggja KT-tænastuna**

Nýskipaða KT-tænastan hevur ein týðandi leiklut í menningini av Fróðskaparsetri Føroya.

KT-tænastan hevur ábyrgdina av teldunetinum hjá stovnunum á Debesartrøð og nær-netinum á Fróðskaparsetrinum. Hon skal stuðla setursdeildum og brúkarum við KT-nýtslu. Hon skal samstarva og samskifta við stovnar og KT-veitararar uttan fyri Fróðskaparsetrið. Og KT-tænastan skal ráðgeva setursráðnum í yvirskipaðum KT-málum frameftir.

Tað krevur tænastusinnað fólk, sum bæði eru tøkniliga væl fyri og hava visjónir. KT-leiðarin skal saman við telduvørðinum vera við til at menna og útbyggja nýggju KT-tænastuna.

**KT-leiðari**
KT-leiðarin hevur yvirskipaðu ábyrgdina og kemur at standa fyri menningini av nýggju KT-tænastuni.
Vit kunnu bjóða eitt mennandi og spennandi arbeiðsumhvørvi, har samstarvað verður við fremstu føroysku granskararnar.

Vit rokna við, at umsøkjarar hava drúgvar royndir við at menna og skipa strategiskt KT-arbeiði. Tú hevur neyðuga førleikan at leggja framtíðarætlanir fyri KT-økið og persónligu eginleikarnar at fremja tær í verki. Tú hevur hægri útbúgving ella viðkomandi royndir innan kunningartøkni, leiðsluroyndir og góð samstarvsevni.

**Telduvørður**
Telduvørðurin hevur ábyrgdina av, at teldurnar virka nøktandi í dagliga arbeiðnum, og at data verða goymd og brúkt á skilabesta hátt.

Vit rokna við, at tú hevur royndir við teimum vanligastu KT-forritunum og ert vanur at vegleiða brúkarar í nýtsluni av teimum. Tú hevur viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir, ert íðin og hevur áræði og góð samstarvsevni.

**KT-tænastan**
KT-tænastan fevnir um Windows- og Linuxskipanir á brúkarateldum, Novell-netskipan og Novell GroupWise postskipan, sum umsøkjarar mugu hava hollan kunnleika til.

Høvuðsbrúkarabólkarnir eru granskarar, undirvísarar, fyrisitarar og studentar, sum brúka KT-skipanir dagliga til samskifti, gransking, undirvísing og fyrisiting.

Dagliga arbeiðið av datanetinum á Debesartrøð fevnir í stuttum um
- at hava eftirlit við kjarnuskipan og samsvarandi samskiftisútgerð
- at viðlíkahalda felags trygdartænastur hjá stovnunum
- at samskifta og samstarva við netvørðarnar á teimum fimm stovnunum
- at umsita web-, ftp-, navna- og postambætararnar
- at samskifta við veitarar av KT-útgerð sum heild
- at samskipa dagføringar, umleggingar og útbyggingar í netskipanini

**Treytir og umsóknir**
Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um størvini og tøknilýsing kunnu fáast við at venda sær til Anniku Sølvará á telefon 352500 ella teldupost annikas@setur.fo

Umsóknir við prógvum, ævisøgu (CV) og møguligum viðmælum skulu stílast til Setursskrivstovuna í seinasta lagi 16. august 2004. Vinarliga ger vart við, hvat starv tú søkir, ella um tú søkir bæði.

Størvini verða sett frá 1. september ella skjótast til ber.

Setursskrivstovan
J.C. Svabosgøta 14
Postrúm 272
FO-100 Tórshavn

*Fróðskaparsetur Føroya er stovnur við 40 starvsfólkum og 150 studentum. Virksemið fevnir í høvuðsheitum um undirvísing, gransking, kunning og fyrisiting.*

*KT-tænastan kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við telduvørðir á stovnunum, sum saman við Fróðskaparsetrinum mynda netsamstarvið á Debesartrøð: Fiskirannsóknarstovan, Landsbókasavnið, Landsskjalasavnið og Náttúrugripasavnið. Talan er um eina fjølbroytta netskipan, sum bindur saman fimm stovnar í 12 bygningum við tilsamans 135 brúkarum.*

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA ·

Fróðskaparsetur Føroya · J.C. Svabosgøtu 14 · Postrúm 272 · 110 Tórshavn · Tel 35 25 00 · Faks 35 25 01 · setur@setur.fo · www.setur.fo

www.sansir.fo